## Fiskaðu meiri í fjør

Íslendsk skip fiskaðu í fjør tilsamans eina millión og 396.000 tons, sum sambært Hagstovuni í Reykjavík var tað 73.000 tons meiri enn í 2006. Fyri fiskin fingu skipini 80 milliardir íslendskar krónur, og tað var 5,4 prosent meiri enn í 2007. Hagtølini vísa, at meginparturin av fiskinum bleiv landaður á Eysturlandinum, og kemst tað av, at meginparturin av uppisjóvarfiskinum kemur upp á land har. Hinvegin varð tað mesta av botnfiskinum viðgjørdur á Suðurlandinum. Hagtølini vísa eisini, at tað mesta av toskinum fór í salt, meðan hýsan yvirhøvur bleiv fryst.



# Meðalgróður og nógv æti á landgrunninum

**Yvirlitstrolingar hjá Fiskirannsóknarstovuni vísa, at gróðurin á landgrunninum er yvir meðal, og at nógv er til av bæði plantu- og djóraæti. Harafturat er yngulin væl fyri, og nógv var at finna í maganum**

FISKIVINNA
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Kanningarnar vístu, at sera nógv plantuæti var á landgrunninum. Tey endaligu tølini eru ikki tøk enn, men í royndunum, sum vórðu tiknar, sást, at nógv plantuæti var í. Hetta vóru smáar algur, sum eru vanligar, tá føðsluevnini minka. Kanningarnar vístu eisini, at mest var til at plantuæti undir landi vestanfyri og norðanfyri. Kanningarnar vístu eisini, at væl meiri plantuæti var landgrunninum enn uttanfyri. Í fjør var støðan tann beint øvugta.

Gróðurin á landgrunninum higartil í ár verður roknaður við støði í minkingum í nøgdunum av nitrati + sannlíkt netto innrák (í meðal 1/75 um dagin); úrslitini síðani 1990 eru víst á myndini. Fiskirannsóknarstovaqn sigur, at samlaði „nýggi" gróðurin higartil í ár var nakað yvir meðal. Møguliga er indeksið eitt sindur undirmett, partvís tí at økið eystur úr Norðoyggjum fekk sjógv frá opnum havi, ið hevði nógv nitrat í, og partvís tí at gróðurin byrjaði sera tíðliga í vár, og tað sæst illa aftur í hesum roknihátti. Fiskirannsóknarstovan hevur nú mátingar frá so nógvum árum, at grundarlag er fyri at betra um roknihátti, soleiðis at hædd kann takast fyri bæði broytingum í gróðuri ígjøgnum várið og nøgdunum av nitrati ymsastaðni á landgrunninum. Fiskirannsóknarstovan sigur, at roknihátturin verður broyttur í summar ella í heyst, og at tá fæst væntandi eitt enn meiri álítandi indeks fyri gróðrinum.

Fiskirannsóknarstovan ger tó vart við, at tað endurskoðaða indeksið verður ikki nógv ørvísi enn tey, sum strikumyndin vísir.

Túrarnir, sum Magnus Heinason hevur gjørt fyrr í ár, hava víst, at væl av djóraæti er til og serliga á opnum havi, men eisini partvís á landgrunninum. Tað sást millum annað í kanningum, sum vórðu gjørdar á landgrunninum seint í apríl.




*Strikumyndin vísir gróðurin innarlaga á landgrunninum frá vári til 26. juni árini frá 1996 til 2008. Brotastrikan vísir meðal fyri øll árini*

*Mynd: Fiskirannsóknarstovan*

Á hesum túrinum var sum heild nógv djóraæti, og millum annað er talan um sløg, sum eru góð føði hjá fiskayngli. Fiskirannsóknarstovan sigur, at undir landi var minni viðhvørt, men at tað er vanligt og serliga tey góðu árini. Orsøkirnar kunnu vera tvinnar: Tey góðu árini er tað trúligt, at at minni reyðæti rekur inn uttaneftir, og harumframt verður nógv etið burturav, tá nógvur fiskayngul er.

### Væl í magunum

Á túrinum kannaði Fiskirannsóknarstovan magainnihaldið í toska- og hýsuyngli frá nøkrum útvaldum støðum. Kanningarnar vístu, at yvirhøvur var væl av føði í magunum. Bara á teimum innaru leiðunum vóru nøkur fá yngul við tómum maga, og í flestu førum var talan um hýsuyngul.

Hjá tí størsta ynglinum var eisini væl av ungum krill, sum eru gýtt í vár, og av krabbalarvum í magunum. Krillnøgdirnar samsvaraðu við kanningarnar, sum vórðu gjørdar í apríl, sum vístu, at væl var til at krilllarvum.

### Minni á Bankanum

Kanningarnar hjá Magnusi Heinasyni vístu, at sum vant var sjógvurin á Føroya Banka millum eitt og hálvtannað stig heitari enn sjógvurin á landgrunninum.

Kanningarnar vístu eisini, at tað var minni av plantuplankton á Bankanum enn uttan fyri Bankan, og at tað var nógv minni plantuæti á Bankanum enn á landgrunninum.

Hinvegin var nógv djóraplankton á Basnkanum sjálvum og rundanum. Fiskirannsóknarstovan sigur, at umstøðurnar til æti á Bankanum líktust sum heild teimum í fjør og í fyrraárið t.v.s. at tað var ikki stórur munur á Bankanum og sjónum uttanfyri.

# Spennandi við toskinum

**Úrslitið av toskayngulkanningunum í ár líkist úrslitinum í 1992, sum gav tveir góðar árgangir seinni**

FISKIVINNA
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Í sínari fyribilsniðurstøðu frá yvirlitstrolingunum við Magnusi Heinasyni skrivar Fiskirannsóknarstovan, at eftir at nøgdin av toskayngli hevur verið minkandi í fleiri ár og sera lítil trý tey seinastu árini, var hon í ár beint oman fyri tað, sum hevur verið meðal fyri árini síðani 1994.



*Fiskirannsóknarstoan mælir til at geva toskinum frið at veksa upp, men tað merkir tó ikki, at fólk kunnu fáa sær eitt kók, sigur Jákup reinert*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Fiskirannsóknarstovan sigur, at hetta er sera áhugavert, tá hugsað verður um framtíðartilgongdina til toskastovnin. Kortini má havast í hguga, at hesin yngulin fyrst skal svimja inn undir land, har hann veksur í millum eitt og tvey ár, áðrenn hann leitar sær út í tann vaksna stovnin.

Hetta er ein hættislig tíð hjá ynglinum, tí nógvir vandar eru inni undir landi. Tí verður vanliga roknað við, at tað endaliga boðið uppá, hvussu gýtingin hjá toski hilnast, fæst ikki fyrr enn í endanum á uppvakstrartíðini.

### Minnir um 1992

Jákup Reinert, fiskifrøðingur, sum var kanningarleiðari við Magnusi Heinasyni, sigur, at tá talan er um tokin, líkist úrslitið kanningarúrslitinum í 1992. Tá eydnaðist gýtingin væl, og nógv kom undan, og úrslitið varð, at vit fingu tveir góðar árgangir inn í fiskiskapin um veturin í 1994 og í 1995.



*Jákup Reinert: - Verður tað sum í 1992, sær tað sera gott út við toskinum*

- Hesi árini vaks stovnurin so skjótt, at tað kundi ikki berast saman við nakað, sum var hent í heiminum fyrr. ICES vildi heldur ikki trúgva okkum, sigur Jákup Reinert.

Um úrslitið verður tað sama hesaferð, dugir Jákup Reinert ikki at siga. Hann vísir á, at yngulin er støðugt hóttur, tá hann kemur inn undir land at veksa upp, og tí fáa vit ikki svarið fyrr enn um tvey ár, sigur hann.

- Men verður gongdin nú tann sama sum í 1992, sær tað sera gott út, sigur Jákup Reinert.